# Hollur javnaðarmaður fyllir 75

Í dag fyllir fyrrverandi tingmaðurin, landstýrismaðurin og fólkatingsmaðurin, Jákup Lindenskov, 75 ár. Hann hevur alt sítt lív verið hollur stuðul undir javnaðarhugsjónini og verið beinleiðis virkin á politiska pallinum í samfull 36 ár heilt frá 1958 fram til 1994. Javnaðarflokkurin hevur stóra virðing fyri hansara drúgva politiska íkasti teimum veikastu í Føroyum at frama.

Jákup varð fyrstu ferð valdur á ting sum 25 ára gamal í 1958, og er hann nú tann einasti eftir av teimum, sum vóru við til at samráðast um sosiallógávuna og við til at fáa lógina um fólkapensjónina ígjøgnum í 1959.



Hann sat á tingi í tvey valskeið í fystu syftu – fram til 1966. Men tá Petur Mohr Dam, løgmaður doyði í 1968, vóru aftur boð eftir Jákupi, sum gjørdist landsstýrismaður og varaløgmaður. Hann varð afturvaldur í 1970 og umboðaði flokkin næstu sjey valskeiðini á tingi, hóast hann var burturfrá tingarbeiðinum meðana hann sat sum landsstýrismaður fram til 1979, tá hann varð valdur í Fólkatingið.

Fólkatingsmaður var hann í trimum umførum – fyrstu ferð tey bæði valskeiðini frá 1979 til 84. Aftur frá 1987-88 og 1990-93, tá hann sat sum varamaður fyri Atla Dam.

Jákup Lindenskov er tí ein tann mest royndi politikarin, sum Javnaðarflokkurin hevur átt, og hann er í dag tann, sum hevur mestu vitanina um tað, sum fór fram, næstan heilt aftur til heimastýrislógina. Eg veit eisini, at hann samstarvaði nógv og tætt við Petur Mohr Dam, og at hann hevur nógva vitan frá honum um fyrstu tíðina hjá flokkinum.

Jákup goymir ikki, at hann helst hoyrir til tann meira sambandska partin av Javnaðarflokkinum. Men hann virðir, at onnur í flokkinum hava ørðvísi áskoðanir um hesi viðurskifti.

Sum nýggjur tingmaður havi eg havt stóra gleði og stórt gagn av at tosa við Jákup, sum ideologist er rætt grundaður – og hann hevur mangan verið holur í ráðum. Vit í flokkinum hava stóra virðing fyri hansara avrikum.

Jákup og Jóna eru altíð fyrikomandi og blíð at hitta, og tey eru so ómetaliga dugnalig til at minnast onnur, bæði í sambandi við gleðiligar merkisdagar og í sambandi við sorgarløtur. Tey eru fólk, sum veruliga liva eftir hugsjónini um, at øll eru ein partur av felagsskapinum.

Hjartaliga tillukku við degnum góði vinur!

**John Johannessen,**
**Formaður Javnaðarfloksins á tingi**



*Fyrsta landsstýrið, sum Jákup sat í: Sámal Petersen, Sjálvstýrisflokkurin, Klaksvík, Kristian Djurhuus, løgmaður, Sambandsflokkurin, Tvøroyri, Jákup Lindenskov, Javnaðarflokkurin, Havn og Villi Sørensen, Javnaðarflokkurin, Klaksvík*

var burturi frá tryggingini næstu 16 árini.

Øll árini hevur Jákup verið virkin innan fráhaldsrørsluna gjøgnum Losjuna í Havn, har rættuliga stórt ungdómsvirksemi var í fimmti og sekstiárunum. Soleiðis var hann eisini við til at stovna hondbóltsfelagið Kyndil í 1956 – hann var formaður í Ungmannadeildini hjá Losjuni tá. Eisini var hann var eitt skifti í sekstiárunum blaðstjóri á Sosialinum.

Jákup var í nógv ár formaður í endurbúgvingarstovninum ALV, hann hevur verið formaður í Heilbrigdinum á Velbastað síðani tað varð stovnað í 1986, hann hevur í nógv ár verið formaður í stýrinum fyri Blindastovnin, og hann er eisini formaður í nevndini fyri Eldratilhaldið í gamla Føroya Bankahúsinum í Tórsgøtu í Havn. Hann varð eisini valdur í fyrsta eldraráðið hjá Tórshavnar kommunu, sum aftur skal veljast á kommunuvalinum seinni í ár, so hóast hann er farin um pensiónsaldur, so hevur hann framvegis nógv jørn í eldinum.

Jákup Lindenskov giftist í 1961 við Jónu, f. Jacobsen úr Fuglafirði. Hon er dóttir Jóhannus Jacobsen, betur kendur sum »skómakarin«, og Ellifiu hjá Óla á Miðgerði. Jákup og Jóna eiga børnini Elin, sum býr í Havn, Biritu, sum býr í Norðragøtu og Eirik, sum býr í Havn. Abbabørnini eru fýra og langabbabørnini eru tvey í tali.

Føðingardagin í dag eru Jóna og Jákup burturstødd.



*Jákup Lindenskov uttan fyri høvuðsdyrnar á Christiansborg í 1979*

## Tøkk



Eina hjartans tøkk verður send til tykkum øll, ið gjørdu mær og mínari familju 105 ára dagin so hugnaligan.
Til tykkum, ið vitjaðu, til tykkum, ið stuðlaðu og stóra tøkk fyri gávur.
Ein serlig tøkk til tykkum á Lágargarði, tað veri seg leiðsla, køkur og Miðstovan.
Eisini ein stór tøkk til Óla Jacobsen fyri tað stóra arbeiði, ið varð gjørt.
Mangar góðar heilsanir til tykkum øll.

**Margretha Egholm við familju**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá góði pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Svend Joensen**

doyði og varð jarðaður.
Ein serstøk tøkk til tykkum øll á E2, sum vóru so góð við hann.

*Fyri tey avvarðandi*

**Arne, Sedea, Henry og Eyðsvein**

**Dagurin**
**11. juni. Barnabas.**
Hann verður fleiri ferðir umtalaður í Ápostlasøguni, men so at siga altíð í sambandi við ápostulin Paulus. Var við á fyrstu trúboðanarferðini hjá ápostlinum. Evangelisturin Markus og hann vóru systkinabørn. Halgisøgan sigur, at hann á føðioynni Kýpros varð tikin av jødum og brendur á báli í árinum 62, halda teir. Í fornkirkjuni var hildið, at hann skrivaði Hebrearabrævið.